# fyri vælferðina



*Landsstýrismaðurin vil ikki hoyra talan um, at hann hevur borið seg skeivt at. Vælferðin kostar, og kassin kann ikki toyggjast longur, sigur hann*
Mynd: Jens Kristian Vang

Eisini hevur landsstýrið valt at gera nógvar stórar íløgur. Aftur við somu grundgeving. Fleiri av íløgunum eru rakstrartungar, og nýggja Suðuroyarskipið er bygt í Spania, og harvið er ikki ein króna komin tí føroyska samfelagnum til góðar. Landsstýrið hevur í hyggju at gera størri íløgur í Føroyum fyri harvið at fáa hjólini her at mala skjótari.

Grundgevingin hjá landsstýrismanninum fyri undirskotinum á fíggjarlógini er eisini, at tað er ikki bara sum at siga tað at sløkkja fyri vælferðartænastum.

- Tá ið tú fyrst er byrjaður at bjóða eina vælferðartænastu, so er stórt sæð ómøguligt at steðga aftur. Vit kunnu ikki verða vælferðartænasturnar fyri uttan, og tað rinda vit prísin fyri í dag.

Landsstýrismaðurin heldur ikki, at tað er samsvar millum krøv og búskaparvøkstur.

- Vit hava verið ov lagaligir at eftirlíka krøvini, sigur Bárður Nielsen.

## Ikki so einfalt

*Men hvussu leingi ber til at hava undirskot á fíggjarlógini?*

- Ein búskapur er ikki so einfaldur, at tú bara brúkar til goymslan er uppi. Tað er ikki í sær sjálvum nakað negativt, at landskassin hevur hall. Tað er nógv meira innviklað. Ein búskapur skal eisini endurspeglað, hvat tú vilt við samfelagnum, sigur Bárður Nielsen.

Hann sigur, at arbeitt verður við at skerja í útreiðsluøkingini komandi árini, so eitt yvirskot aftur kann hómast. Ætlanin er at afturhalda omanfyri hundraðmilliónir krónur í øktum útreiðslum, t.e. ikki í beinleiðis sparingum, men vit eitt nú nullloysnum, umleggingum og tillagingum.

Lønir mynda næstan helmingin av fíggjarlógini. Landsstýrismaðurin leggur tískil stóran dent á, at hesar verða hildnar so langt niðri sum gjørligt.

- Landsstýrið og samgonga ætla komandi árini at forða útreiðslunum at hækka munandi. Nulloysnir eru við í ætlanum, sum hevur til endamáls at fáa yvirskot á fíggjarlógini.

*Er hetta ikki ein øgiliga primitiv búskaparstýring - við at spara og halda aftur í útreiðslum ?*

- Hetta er primitivt. Men hetta er eisini veruleikin, ið vit mugu fyrihalda okkum til. Hetta loysir ikki einsamalt trupulleikan - men sama við øðrum tillagingum, sigur Bárður Nielsen.

Tøl frá Fíggjarmálaráðnum vísa, at tað er avlop á handilsjavnanum og gjaldsjavnanum, og útlit eru til betri tíðir.

- Tað gongur upp og niður í búskapinum. Fyri nøkrum árum síðani hildu vit, at trøini fóru at vaksa inn í himmalin, men tað gera tey ógvuliga sjáldan, sigur Bárður Nielsen.

## Til høgru

Stevnan hjá landsstýrismanninum og samgonguni er við at hómast búskaparliga. Og gongdin er ikki júst serliga vinstravend. Fyrsta stigið er at einskilja almennu fyritøkurnar. Og stendur tað til Bárð Nielsen, so verður alt vinnuligt, sum nú er á almennum hondum, privat. Allar tænastur, sum kunnu verða røktar av privatum og virka á vinnuligum treytum. Undantikið er sjúkrahús og líknandi.

- Málið er, at innan tvey ár eru vit komin væl áleiðis við at einskilja størsta partin av teimum almennu vinnuligu fyritøkunum. Peningurin frá søluni skal ikki nýtast til at lappa fíggjarlógina saman - men til at rinda skuldina hjá landskassanum, sigur Bárður Nielsen.

Øll skulu eisini sleppa at keypa - eisini útlendingar.

- Skulu vit verða partur av altjóðaagerðingini, so kann tað ikki gerast hálvhjartað, sigur Bárður Nielsen.

Skattapolitiska stevnan hjá landsstýrismanninum leggur eisini upp til eina markanta broyting.

- Tað stendur meira og meira greitt, at tey lond, sum klára seg væl í heiminum í dag, taka minni inn í beinleiðis skatti og áseta fleiri óbeinleiðis skattir (brúkaragjøldo.a., blðm), sigur Bárður Nielsen.

Tann progressivi føroyski skattastigin eigur eisini at verða skiftur út, heldur landsstýrismaðurin. Hesin drepur hugin at arbeiða og forivinna nakrar krónur afturat.

- Eg meti sjálvur, at rindaðu øll 35% í skatti, so hevði landskassin fingið tað sama inn sum nú, sigur Bárður Nielsen.

Sum sambandsmaður er tað ikki so løgið, at landsstýrismaðurin er harmur um, at blokkurin varð skerdur av undanfarnu samgongu. Hann hevur einki ímóti, at blokkstuðulin fjarðar burtur við tíðini, men tað er ikki treytaleyst.

- Blokkstuðulin hevur verið øgiliga góður fyri okkara samfelag. Eg tori at pástanda, at vit ikki høvdu havt eitt so væl útbygd samfelag uttan hann. Hann er als ikki skaðiligur. Men eg havi einki ímóti, at hann verður spakuliga tikin burtur, men vit skulu hava nakað at seta ístaðin, og tað hava vit ikki sum nú er, sigur Bárður Nielsen.

# Vil hava høvuðs-sáttmálar

**Eisini landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vil broyta viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Tað loypir óivað ikki hvøkk á fólk, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki er nøgdur við viðurskiftini á arbeiðmarknaðinum. Og hann vil hava broytingar framdar. Millum annað fyri at verkføll ikki skulu koma so ofta fyri.

- Ongin vil pilka við tann grundleggjandi rættin at samráðast og at fara í verkfall, men við skipaðum viðurskiftum á arbeiðsmarknaðinum slepst undan, at fakfeløg at kalla skiftast um at fara í verkfall. Ein treyt fyri, at arbeiðsmarknaðurin virkar, er sjálvandi eisini, at fakfeløg virða ta friðarskyldu, sum er galdandi og ikki í tíð og ótíð hótta við ólógligum verkføllum. Hetta er ein ótolandi óskikkur, ið ikki hoyrir framkomna samfelagnum til", sigur Bárður Nielsen

Sum ovasti fyri Fíggjarmálaráðið skal landsstýrismaðurin samráðast við 32 fakfeløg um sáttmála.

- Eins og við búskapinum hava vit brúk fyri einum reformi á arbeiðsmarknaðinum. Mítt uppskot er, at feløgini gera høvuðsavtalur, soleiðis at talið av sáttmálum minkar, sigur landsstýrismaðurin.